Sosialurin

...títt vinnublað





VINNAN

VINNU- OG HANDILSTÍÐINDI Í SOSIALINUM

# Norðurlendsk oljufeløg taka saman hendur

**Størsta loyvi, sum nakrantíð er latið til oljuleiting á føroyska landgrunninum, er L016, sum liggur í ein landnyrðing úr Føroyum, nógv norðari enn leitað hevur verið áður. Tað fer til eitt samtak, sum fevnir um fýra norðurlensk oljufeløg, norska Statoil/Hydro, danska DONG og føroysku Atlantic Petroleum og Faroe Petroleum**



*Norðurlendsk oljufeløg saman um at finna føroysku oljuna og gassið. Nils Sørensen, stjóri í Faroe Petroleum, Regin Hammer, stjóri hjá DONG, Rúni M. Hansen, stjóri í StatoilHydro og Wilhelm Petersen, stjóri í Faroe Petroleum*

*Mynd Jan Müller*

**3. ÚTBJÓÐING**
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Umboð fyri føroysku feløgini vóru sera fegin um úrslitið av 3. Útbjóðingini, nú loyvini vórðu latin mánamorgunin. Hýrurin á føroyska umboðnum fyri danska felagið varð eisini góður, nú feløgini eru farin í samstarv við norska oljurisan StatoilHydro sum flaggskip í hesum norðurlendska oljuflotanum.

## Atlantic Petroleum

Wilhelm Petersen, stjóri í Atlantic Petroleum: -Vit hava verið saman í øðrum loyvum, og vit síggja fram til at samstarva í hesum sterka samtakinum, har StatoilHydro er fyristøðufelag. Tað, sum er sermerkt við hesum samtakinum, er m.a. fyri okkara viðkomandi, at tøkniligu fólkini, sum arbeiða hjá okkum í London, hava verið við í leitingini við Føroyar frá byrjan. Tey síggja fram til at arbeiða saman við góðum og royndum fólkum hjá hinum feløgunum.

## Faroe Petroleum

Nils Sørensen, stjóri í Faroe Petroleum: - Hetta verður sera spennandi, og hyggja vit eftir útbjóðingini síggja vit, at hetta eru feløg, sum hava verið við frá byrjan. Hóast feløgini fækka, so síggja vit nú, hvørji feløg hava Føroyar sum fokusøki. Og tí er tað eisini náttúrligt, at tey arbeiða meira og meira saman, tí nógv planlegging skal til. Vit síggja fram til eitt gevandi samstarv.

## DONG

Regin Hammer, stjóri í Dong: - Vit eru við í sera nógvum loyvum vestan fyri Hetland og nú eisini í føroyskum øki. Vit eru sera fegin um at vera við í einum norðurlendskum bólki sum hesum. Tað verður spennandi at arbeiða saman við hesum feløgum. Atlantsmótið, sum fevnir um økini vestan fyri Hetland og Føroyar, eru kjarnuøki hjá Dong. Hóast oljan er gularótin, so sær Dong stórar møguleikar í enn goymdum gassgoymslum millum Føroyar og Hetland.

**Demich P/F Tórshavn**
Postboks 378 - Stiðjagøta 2
FO-110 Tórshavn
Telefon +298 309 310
demich@demich.fo

**Demich P/F Vágur**
Á Marknoyri
FO-900 Vágur
Telefon +298 37 35 35
demich@demich.fo

**Demich P/F Runavík**
Heiðavegur 80
FO-610 Saltangará
Telefon +298 445500
demich@demich.fo

VØLUND VARMETEKNIK





HITI • VENTILATIÓN • SANITET

Vit hava røttu loysnina til júst tín tørv.

Umhvørvisvinarlig orka við hitapumpu frá Demich

demich